


# Smyril Line vil hava norðmenn til Danmarkar at ferðast

**Við at bjóða norðmonnum bíligar vikuskiftisferðir til Hansthom væntar Smyril Line at vinna stóran part av innkeypstúr- og jólafrokostsmarknaðinum, sum Fjord Line og Color Line seinastu árini hava gjørt sær dælt av. Í vetur liggur Norrøna í Hanstholm leygardag frá kl 9-18**

FERÐAVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nú Norrøna skjótt aftur fer undir vetrarsiglingina, eru tey á Smyril Line í ferð við eina rættiliga umfatandi marknaðarføring í Noreg. Ætlanin er púra greið: Tey vilja hava norðmenn at ferðast við Norrønu til Danmarkar.

- Vit fara rættiliga aggresivt til verka í vetur í Noreg. Í veruleikanum fara vit beinleiðis eftir kjarnuferðafólkunum hjá Fjord Line. Vit bjóða norðmonnum ein vikuskiftistúr úr Bergen til Hanstholm fríggjadag til sunnudag, sigur Hendrik Egholm, sum er marknaðarstjóri á Smyril Line.

- Vit hava gjørt eitt nýtt produkt. Prísirnir eru enn lágir, men í ár liggja vit longri í Hanstholm leygardag – frá kl 9 á morgni til kl 18 á kvøldi, sigur hann.

Hetta gevur teimum góðar møguleikar at skipa fyri shoppingtúrum – og tað er júst tað, sum norðmenn vilja, sigur Hendrik Egholm.

Smyril Line bjóðar norðmonnum bíliga sigling, og tá komið verður til Hanstholm, bíða bussar á bryggjuni, sum koyra teir innkeypsútferðir til Bilka og IKEA í Aalborg.

Umframt sigarettirnar dámar norðmonnum serliga væl at keypa kjøtvørur í Danmark. Tískil fer Smyril Line eisini at bjóða fram goymslu av køli- og frystivørum í konseptinum til norðmenn.

- Hartil fara vit at leggja okkum eftir at fáa norskar fyritøkur at halda jólafrokost umborð á Norrønu, meðan vit sigla frá Bergen til Hanstholm. hetta hava vit ikki roynt áður, men Fjord Line og Color Line hava vunnið heilt fitt av peningi upp á hetta, sigur Hendrik Egholm.

- Alt í alt snýr tað seg um at gera alt fyri at betra um søluna hjá Smyril Line. Smyril Line vinnur meginpartin av søluni uttanlands, og tessvegna eru flestallir kappingarneytar okkara útlendskir, sigur Hendrik Egholm, sum vísir á, at fyrri parturin av vetrinum og summarið hevur gingið sera væl hjá Smyril Line.

- Men í heyst og seinna partin av vetrinum fara vit at gera enn meira fyri at økja søluna. Tí fara vit í heyst og vetur harðligari til verka á norska marknaðinum fyri at fáa størri bitar av norska innkeypstúr- og jólafrokost marknaðinum, sigur Hendrik Egholm, sum leggur dent á, at felagið enn sum áður fer at hava sera lágar prísir fyri føroyingar, sum vilja til Danmarkar í vetur – ella standa á skíð í Noreg.



*- Hjá okkum snýr tað seg um at gera alt fyri at betra um søluna hjá Smyril Line, sum vinnur meginpartin av søluni uttanlands, og tessvegna eru flestallir kappingarneytar okkara útlendskir, sigur Hendrik Egholm, sum vísir á, at fyrri parturin av vetrinum og summarið hevur gingið sera væl hjá Smyril Line*

## FAKTA

Smyril Line legði í januar í ár vetrarstrategiina um. Frá at steingja av stórar partar av skipinum og spara so nógv sum til bar, royndu tey eina nýggja strategi, har tey:

• Settu prísirnar í botn (Føroyar – Hanstholm t/r við bili 500 kr.) – bæði í Føroyum, men á øllum hinum marknaðunum eisini

• Fóru at sigla upp á Bergen um veturin – var eisini gjørt fyri nøkrum áðrum síðan, men varð so slept

• Settu hart inn á norska marknaðinum, har roynt varð eftir norðmunnum, sum gera innkeypstúrar í Danmark. Hesum marknaði hevur Fjord Line traditionelt sitið á, í seinastuni eisin Color Line. Smyril Line læt bíligar ferðaprísir – men norðmenn keypa sera nógv umborð

- Hetta var ein góð avgerð, tí sølan øktist nógv, bæði úr Føroyum, Danmark, men ikki minst úr Norra, sigur Hendrik Egholm, marknaðarstjóri á Smyril Line.




# Gravgangur eftir íløgukvøldum hjá Føroya Banka

**Herfyri boðaði Føroya Banki frá, at bankin fór at skipa fyri íløgukvøldi fyri kvinnum í Miðlahúsinum mikukvøldið 23. august. So stórur gravgangur er eftir at sleppa við, at bankin nú hevur gjørt av at skipa fyri trimum íløgukvøldum í Miðlahúsinum, mikukvøldið 23., hóskvøldið 24. og fríggjakvøldið 25. august kl. 19.30**

ÍLØGUKVØLD FYRI KVINNUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Føroya Banki hevur sett saman eina spennandi skrá til íløgukvøldini. Úr bankanum fara Rúna Hentze, íløguráðgevi, og Kristina Háfoss, verkætlanarleiðari, at bera fram góð ráð um eftirlønaruppsparing og íløgumøguleikar. Ein kend kvinna úr føroyskum samfelagslívi fer eisini at siga sína hugsan um kvinnur og pengar.

- Endamálið við íløgukvøldunum er fyrst og fremst at upplýsa um, hvørjar fíggjarligar møguleikar kvinnur hava, og eggja kvinnum til at taka størri ábyrgd av egnum fíggjarviðurskiftum, sigur Føroya Banki á heimasíðu síni.

Kanningar hava víst, at kvinnur duga serliga væl at fáa avkast av íløgum, tí tær hava eina so veruleikakenda fatan av váða og møguligum vinningi. Meira verður at hoyra um m.a. hetta á íløgukvøldunum.

Millum framløgurnar verður tónleikur at hoyra, og skemtilig brot úr sjónleiki verða framførd. Eftir framløgurnar bjóðar Føroya Banki ábit, sum bara mannligir tænarar servera!

Stóri áhugin fyri íløgukvøldunum hjá Føroya Banka bendir á, at kvinnur gerast alsamt meira tilvitaðar um týdningin av, at tær er væl kunnaðar um síni egnu fíggjarviðurskifti, siga tey í Føroya Banka.



*Frá fundi í Miðlahúsinum. Í næstu viku verða tað bara kvinnur, sum luttaka á fundunum*